## Viðmerking:

# Ósannar ákærur í Vinnuvitan

Vit undirritaðu afturvísa við hesum tær grovu, ógrundaðu skuldsetingar, ið reistar vórðu móti okkum í blaðnum Vinnuvitan hósdagin 3. mai. Samstundis átala vit hvassliga tað sera lága journalistiska støði, sum greinarnar, íroknað oddagreinin í blaðnum, eru á, har beinleiðis verður logið um okkum, uttan at nakar av blaðnum ómakar sær at biðja um okkara viðmerking. Vit skulu gera greitt, at alt, vit í hesum skrivi føra fram, kann skjalprógvast.

Tað er beinleiðis lygn, tá stjórin í partafelagnum Thor leggur partaeigararnar í Ocean Group Faroes undir at fremja kvettroynd móti Thor fyri at ogna okkum skipið Athenu. Ocean Group, og ikki Thor, átti Athenu. Thor átti 11 prosent av partapeninginum í Ocean Group.

Tá Ocean Group varð stovnað seint í 2005, varð vald ein fyribilsstjórn. Til stjóra varð settur Hans Andrias Joensen, og til nevndarformann varð valdur Gunnbjørn Joensen. Sum frá leið fóru partaeigarnir at sóknast eftir einum regluligum aðalfundi, sum ongantíð hevði verið hildin. Heldur eingin roknskapur var tøkur.

Allur rakstur av skipinum er avgreiddur av manningini og skrivstovuni í Las Palmas. Tað einasta, Thor hevur havt við raksturin at gera, er at flyta hýrur, sum íslendski skrivstovumaðurin í Las Palmas hevur givið boð um. Síðan skipið fór í drift, hevur stjórin einaferð verið umborð í 10 tímar, og nevndarformaðurin ongantíð.

Sum fráleið fóru partaeigararnir í Ocean Group at sóknast eftir upplýsingum um raksturin og vildu síggja tøl. Uppá fyrispurning varð vanliga svarað, at tað gongur fínt, men eingi tøl blivu nakrantíð framløgd. Hetta gjørdi, at álitið hjá partaeigarunum á leiðsluna so við og við fór at minka.

Tá skipið, Athene, varð keypt, bleiv tað umbygt, og millum annað varð verksmiðjan tikin úr og seld fyri góðar 2 mió. krónur. Hóast tað var Ocean Group, sum átti Athenu og seldi verksmiðjuna, hava vit seinni fingið prógv fyri, at rokning fyri søluna varð send frá Thor, sum var vanligur partaeigari í Ocean Group. Ongastaðni hevur borið til at fingið ávíst, hvar hesin peningur er endaður.

Rættiliga tíðliga í øllum málinum hótti Hans Andrias Joensen beinleiðis hinar partaeigararnar við, at um teir ikki gjørdu, sum hann vildi, skuldi hann eftir einari nátt syrgja fyri, at partapeningurin hjá teimum varð gjørdur til einkis. Hann hevur seinni váttað hesa hóttan fyri einum av partaeigarunum. Hendan váttanin er fest á band. Tá vit síðan hava staðfest, at stjórin uttan okkara vitan hevur tikið lán á ljóðandi allan partapeningin, sum hann við bankans vælvild kann gera um til partapening í felagnum, skilja vit, hvat hann meinti við hesi hóttan.

Eftir, at vit leingi høvdu strongt á at fáa aðalfund, varð ein nevndarfundur so hildin tann 21. december 2006. Á hesum fundi kom av tilvild fram, at stjóri og nevndarformaður, uttan at aðrir partaeigarar ella nevndarlimir vistu av nøkrum, tann 4. juli 2006 høvdu tikið eitt lán í táverandi Føroya Sparikassa á ljóðandi 9 mió. krónur. Tað sama sum samlaði partapeningurin var. Hetta var eitt lán, sum var tikið afturat verandi fígging uppá 125 mio kr.. Treytin var, at Sparikassin, seinni Eik banki, skuldi hava nakrar óvanligar sersømdir. Sum treyt fyri lánínum kravdi Eik Banki nevniliga helvtina av avlopinum hjá Athenu áðrenn skatt í samfull 7 ár, umframt at lánið sjálvandi skuldi gjaldast aftur við rentum. Ocean Group skuldi so av tí peningi sum tá var eftir gjalda skatt og rakstur av skipinum.

Tað er greitt, at tá slíkt fer fram, uttan at hinir eigararnir vita av tí, missa vit álitið á hesar menn og vilja fegnir hava umskipað leiðsluna í felagnum. Eftir at vit í ein mána høvdu roynt at fáa hendur á áður nevndu lánsskjølum, eydnaðist tað tann 8. februar 2007. Tá fingu vit avrit við telefaksi frá Eik banka.

Sjálvandi strongdu vit enn meir á at fáa ein aðalfund, og hann varð lýstur at verða í Hósvík tann 27. mars 2007.

Tað er beinleiðis ósatt, tá sagt verður í Vinnuvitan, at hvørki stjóri ella nevndarformaður vistu um fundin. Nevndarformaðurin kallaði umvegis sakføraran hjá Thor inn til fundin.

Fundurin varð tó av ongum, tí tá hann skuldi setast, kom fram, at teir høvdu gloymt at geva einum av partaeigarunum, Klæminti Olsen, fundarboð. Tískil var innkallingin ógildug.

Heldur ikki tá fingu vit innlit í fíggjarstøðuna hjá felagnum, og álitið á stjóran og nevndarformannin minkaði uppaftur meira.

Í einari av greinunum í Vinnuvitan verður íslendska felagið Samherji drigið inn í hetta málið og gjørt til tann stóra skurkin, sum bjóðar okkum nógvar pengar undir borðinum fyri at fáa ræði á Athenu.

Stjórin í Samherja bjóðaði opinlýst upp á partapeningin hjá Royndini. Hesum vistu allir hinir eigararnir av, tí teir høvdu forkeypsrætt. Alt fór fram eftir forskriftunum. Hendan tilgongdin tekur vanliga einar tveir mánar. Handilin gjørdist tó ongantíð veruleiki, og boðið bleiv tikið aftur.

Fyri at fáa tað at síggja út, sum synd er í teimum, siga stjórin og nevndarformaðurin í Ocean Group, at hetta málið hevur kostað teimum millum 50 og 60 mió. Staðfestan kann, at kostnaðurin fyri tann partapeningin, teir hava keypt frá øðrum partaeigarum, er kr. 22.750.000,-. So tann parturin av greinini er eisini ósannur.

Tað er ógvuliga hugstoytt at verða nevndur kriminellur, landasvíkjari og onnur heiti, sum vit ikki vilja taka uppaftur, í einum blað, sum vit annars hava hildið verið rættiliga seriøst. Vit vænta at fáa eina treytaleysa umbering fyri tær lygnir, ið settar eru fram um okkum í hesum sambandinum.

***Magnus Gudmundsson og Elias Christophersen***
*fyrrverandi partaeigarar í Ocean Group og skiparar á Athenu*


## Fíggjarleiðari til Strandfaraskip Landsins

Kanst tú stýra búskapinum? Dámar tær avbjóðingar? Ert tú ein góður leiðari?

Strandfaraskip Landsins sóknast eftir einum dugnaligum og dámligum fíggjarleiðara at byrja skjótast gjørligt, nú okkara fíggjarleiðari hevur tikið við nýggjum avbjóðingum í føroyska vinnulívinum.

**Starvið**
Fíggjarleiðarin hevur ábyrgdina av og skipar fyri fíggjarstýringini og roknskaparhaldinum á Strandfaraskipum Landsins. Fíggjarleiðarin er partur av leiðslubólkinum og vísir beinleiðis til stjóran.

**Umsøkjarin**
Tú hevur útbúgving og royndir innan fyri fíggjarstýring og/ella roknskap. Royndir við fíggjarstýringsskipanini hjá Navision og kunningartøkni annars eru ein fyrimunur. Vit vænta, at tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevni, og royndir í prosjektleiðslu eru ein fyrimunur. Tú arbeiðir analytiskt og málrættað, og tú megnar at orða teg væl bæði munnliga og skrivliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt avbjóðandi starv við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Leiðarin hevur stóra ávirkan á egin viðurskifti og menningina av Strandfaraskipum Landsins.

Starvið er lønt í 36. lønarflokki hjá Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannstarv. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

Arbeiðsstaðurin er í løtuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri.

**Umsóknir**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Regin Vágadal, stjóra, ella Niels Juel Arge, fíggjarleiðara, á telefon 34 30 00. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Skrivligar umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 21. mai 2007 kl. 12:00, og skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Att.: Páll Heinesen
Yviri við Strond 4
Postboks 88
FO 110 Tórshavn

Ella teldupost: pah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Rakstrar-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.





Lesið Sosialin so eru tit við